Heimasíður
Internet hjálp
Lýsingar
Skelti
Búmerki
Sniðgeving

Alfevnda lýsingastovan
á Skálafjørðinum

Um tað er ein lýsing, ein faldari, ein fundarmappa,
ein heimasíða, eitt búmerki ella eitt visitkort, ið skal gerast
- so kunnu vit bjóða eina kappingarføra loysn
- til vinnuna og til privatfólk.

Kom og vitja okkum á Vørumessuni
í ítróttarhøllini á Hálsi 10.-12. sept.

KREA.FO

Heiðavegur 15 | FO-600 Saltangará | Tel 44 93 39 | krea@krea.fo | www.krea.fo

Her er tann nýggi trukkurin
Linde H-40 modell 394




Hann fæst í diesel ella gass frá 4 - 5 tons.
Hetta er ein trukkur í serklassa.

Setið tygum í samband við okkum,
og vit senda tygum tilboð

Vit síggjast á bási nr. 17

SP/F NORÐ TRUKK
Mykinesgøta 3 · Postrúm 1315 · 110 Tórshavn
Tlf. 315136 / 215136 · Fax 310931
E-mail: nordtruk@nordtrukk.fo

# Alfevnda lýsingastovan á Skálafjørðinum



Snýr tað seg um eina heimasíðu, eina lýsing ella eitt búmerki sum skal gerast, ein handil ella ein bil sum skal prýðast, ella eitt forrit sum skal gerast -- ja so bjóðar reklamuvirkið Krea eina kappingarføra loysn. Nøkulunda soleiðis stendur at lesa á www.krea.fo og hetta er eisini ein beinrakin umtala av hesi fyritøku.

Við at kalla seg "Alfevnda lýsingastovan á Skálafjørðinum" vil Krea gera vart við at felagið hevur ein hollan og breiðan førleika innan grafiskt design so væl sum interaktivt samskifti.

»Styrkin hjá okkum er at vit eru alfevndir,« segði forritarin Oddmar S. Olsen, leiðari á fyritøkuni. »Vit kunnu sniðgeva alt ið eitt virki hevur brúk fyri t.d. skelti, visitkort, brævpappír, brævbjálvar, pennar, plastposar, faldarar, heimasíðu og so framvegis.«

Sniðgevin á Krea, Sjúrður Højgaard, er kendur í grafiska heiminum. Hann hevur m.a. teknað mong kend búmerki, eitt nú fyri Tryggingarfelagið Føroyar, Atlantic Airways, Landsverk og gjørt nógvar kendar faldarar og bløð, meðan hann arbeiddi hjá eini av lýsingastovunum í Havn.

»Vit hava fólk sum eru von at gera lýsingar; vit taka eitt prát við tann sum vil lýsa og saman finna vit út av hvør málbólkurin er og hvussu hann best verður náddur við boðskapinum. Vit sniðgeva eisini prentlutir av øllum slagi, til dømis faldarar, bløð og pengakort. Og tá eitt virki ella handil skal prýðast, gera vit uppskot um útsjónd. Tiknar verða digitalar myndir sum vit gera tekningar eftir. Tá upplegg-ið er góðtikið, skipa vit fyri framleiðslu og uppsetan.«

Á Krea starvast, umframt Oddmar Olsen og Sjúrður Højgaard, Kajsten Højgaard forritari, Martin Anthoniussen forritari umframt onnur ið starvast sum freelance. Felagið tók í fjør lut á Vørumessuni og fekk stóran respons upp á demonstratiónir av einari dynamiskari heimasíðu skipan. Í ár er so ætlanin at vísa fram fleiri síður av hvat fyritøkan kann bjóða.

Heilsølan við teimum sterku merkivørunum




SANSIR TEL 355 355

Toms Krás KEMILUX GEVALIA Knorr Coca-Cola STIMOROL Nestlé OMO Mars HARIBO Colgate

Vit kenna tey øll. Merkini, sum eru ein rótfestur partur av okkara gerandisdegi. Koma óvæntaðir gestir, bjóða vit teimum Gevalia. Coca-Cola fær lívið at smakka væl. Holini vera eingin við Colgate. Og klæðini verða reinast við OMO.
Øll hesi merkini hava í Føroyum ein felagsnevnara: P/F Poul Hansen. Heilsølan hevur mong ár á baki og kann millum annað takka øllum sínum góðu merkivørum fyri, at hon er landsins størsta heilsøla, ið røkkur út í hvønn handilskrók.
Knorr, Krás og Kemilux. Haribo, Nestlé og Stimorol. Vit kundu hildið á. Og tað ætla vit eisini. Vit hava merkini til tað.

Poul Hansen Heilsøla
sterkar merkivørur




VIT ERU Á VØRUMESSUNI Á HÁLSI 10.-12. SEPTEMBER Á BÁSI NR. 38

HAR SÝNA VIT FRAM TORO-SUPPUR, SÓSIR, GRÝTURÆTTIR,
OG SJÁLVANDI EISINI MR. LEE.

SMAKKIROYNDIR VERA EISINI AT FÁA. VÆLKOMIN

SP/F VIGGO KJELD
HEILSØLA
ÁARGEIL 2 · FO-100 TÓRSHAVN · TEL 311707 · FAX 310707 ·

Energizer Battaríir og lummalyktir
til øll endamál




TDK
Videobond ymiskar longdir

3M TAPE
LÍM
MÁTTIR
POST-IT o.a.

Básur nr. 4

P/F Jógvan Weihe HEIL- & SMÁSØLA
STARAVEGUR 15 · BOX 1008 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF. 31 38 97 · FAX 31 38 83
E-MAIL: jwimport@post.olivant.fo · HEIMASÍÐA: www.jogvan-weihe.fo